# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*– Vit kunnu ikki geva NSÍ skyldina fyri, at vit liggja til at flyta niður.*

*Súni Fríði Barbá, B68-álopsspælari*

# Einki er líka mikið

**FM stríðið fer í morgin at standa á Eiði og í høvuðsstaðnum, og telvingin um at sleppa undan niðurflyting verður í Runavík, á Skála og í Gundadali**

FYRITREYTIRNAR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Í morgin verður lok lagt á fótbóltsárið 2006. Tá er 27. umfar í Formula deildini á skránni, og spenningurin er stórur. Bæði í toppinum, har EB/Streymur og HB kappast um FM heitið og í botninum, har ÍF, B68 og VB/Sumba stríðast um at verða felagið, sum fer at leypa av, tá ið fasittlistin verður liðugur, og tvey nøvn fara at standa niðanfyri niðurflytingar strikuna.

Í morgin verður staðfest, um EB/Streymur fer at megna at varðveita styrkina og støðufestið, sum krevst fyri at vinna fyrsta FM heitið nakrantíð, ella um HB á málstrikuni fer at snýta felagsliðið.

EB/Streymur vinnur FM, um felagsliðið megnar javnleik á heimavølli móti KÍ. EB/Streymur er tvey stig og ellivu mál frammanfyri HB, sum á heimavølli skal spæla ímóti ÍF. Hjá fuglfirðingum verður tað bara sigurin, sum kanska fer at bjarga teimum undan niðurflyting, men tað fer at valdast um úrslitini hjá B68 og VB/Sumba.

Motivatiónin hjá KÍ á Eiði verður at varðveita fjórða plássið og rættin at luttaka í Intertoto. Um KÍ fær fult á Eiði, so er møguleiki at røkka bronsuni.

Steypavinnararnir í B36 hava góð kort á hondini í bronsustríðnum. Triðja plássið kunnu teir missa til GÍ, um gøtumenn vinna við fýra málum og til KÍ, um klaksvíkingar fáa fult á Eiði, og um B36 ikki fær meiri enn eitt stig í Gøtu.

Meðan FM stendur upp á spæl í Gundadali og á Mølini, so fara úrslitini í Gundadali, á Skála og í Runavík at gera av, hvørji tvey feløg skulu flyta niður.

ÍF hevur 16 stig, B68 18 stig og VB/Sumba 19 stig. Málmunurin kann fara at verða avgerandi fyri niðurflytingina. Málmunurin hjá ÍF er – 31, hjá B68 – 22 og hjá VB/Sumba – 49. Einasti møguleikin fyri ÍF bjarging er, at fuglfirðingar vinna í Gundadali og at VB/Sumba og B68 einki stig fáa.

VB/Sumba bjargar sær við sigri á Skála ella við javnleiki, um B68 ikki vinnur í Runavík. Møguleikin hjá B68 er treytaður av størri úrtøku í Runavík enn VB/Sumba úrtøkuni á Skála.



HB ella EB/Streymur vinnu seinnapartin í morgin føroyameistaraheitið í mansfótbólti 2006

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## GÍ fer eftir møguleikanum

**GÍ hevur enn ein møguleika at røkka evropeiskari luttøku. Til tess krevst ein sigur á B36, sum í sínum lag vil varðveita triðja plássið. GÍ verður uttan Sámal Joensen, meðan B36 hevur allar mans tøkar til dystin.**

FÓTBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

GÍ tekur leygardagin ímóti B36 í síðsta umfari av Formula deildini. Um alt gongur eftir ætlan hjá gøtumonnum, kunnu teir røkka evropeiskari luttøku. Fyrst skulu teir tó vinna á B36, meðan KÍ ikki skal vinna á Mølini ímóti oddaliðnum.

Áslakur Petersen hjá GÍ sigur, at teir sjálvandi ætla at elta møguleikan, men hann ásannar, at hetta ikki verður lætt.

- Vit ætla at royna at røkka fjórða plássi, soleiðis at vit sleppa út í Evropa. Tað verður ikki lætt, men vit skulu bara vinna, og so er at vóna, at KÍ missir stig á Eiði.

GÍ má tó vera ein av týdningarmesta leikarunum hetta árið fyri uttan, tí Sámal Joensen verður ikki við vegna skaða. Hann fekk ein snudd í knæið undir venjing og var ikki við ímóti KÍ seinasta. Sámal spælir heldur ikki í morgin. Áslakur heldur hetta sjálvandi vera óheppið.

- Sjálvandi er tað keðiligt, at Sámal ikki er við. Men Símin Louis og Sam Jacobsen spældu mitt á miðjuni ímóti KÍ týsdagin, og tá gekst bara heilt væl.

B36 ætlar sær tó ikki inn til Gøtu at slappa av. Teir ætla sær í Sarpugerð eftir øllum teimum stigunum, sigur Bergur Midjord, sum skoraði annað av B36-málunum í javnleikinum ímóti Skála týskvøldið.

- Ja, vit ætla okkum heilt sikkurt til Gøtu at vinna dystin. Vit kunnu enn missa okkara triðja pláss, og tað vilja vit ikki. Tí fara vit eftir sigrinum.

Hjá B36 hava verið onkrir smærri snuddir, men Bergur sigur, at allir mans eru tøkir til dystin leygardagin.

# Gestirnir kunnu avgera sjálvir

**Móti einasta liðnum, sum einki hevur at spæla fyri, ætlar VB/Sumba at vissa sær neyðugu stigini á seinasta leikdegi**

SKÁLA-VB/SUMBA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Skála endar á sjeynda plássinum. Tað er tað einasta, sum liggur fast undan seinasta leikdegi í Formuladeildini.

Hetta hevur verið støðan nú í nøkur umfør, men hóast hetta, so tykist ikki, sum hava Skálamenn mist allan hugin at spæla bólt. Seinastu vikurnar hava teir fingið javnleik móti trimum av liðunum, sum eru oman fyri á talvuni, og lítið er at ivast í, at teir fegnir vilja enda árið væl við einum sigri.

Til dystin leygardagin er Pauli G. Hansen einasta ivamálið. Hann fór út úr dystinum móti B36 við skaða, og síðani hevur hann ikki fingið vant.

Hjá VB/Sumba eru allir mans tøkir. Og har er málið púrasta greitt. Sigurin á NSÍ lyfti liðið upp um niðurflytingarstrikuna, og tað arbeiðið kann gerast liðugt leygardagin. Megnar VB/Sumba at taka øll stigini á Skála, er tað nevnliga púrasta líkamikið, hvussu skerst hjá B68 og ÍF í sínum dystum. So hóast teir eru á útivølli, so fer VB/Sumba at spæla fyri øllum trimum stigunum leygardagin.